# Særdi mann við knívi

síða 15

tíðindablaðið sosialurin
7,-
Nr. 161 ★ fríggjadagur 26. august 1994

# Pussa nú samgonguskjalið

*– og so verður farið undir at býta málsøki og seta nøvn á*

Nú skuldu seinastu trupulleikarnir verið loystir í samband við skipan av samgongu millum Sambands-, Fólka,- Mið- og Kristiliga Fólkaflokkin. Í gjár seinrapartin varð samgonguskjalið fínpussað, sum samgongufólk tóku til, og sum skilst liggur uppskotið til fíggjarlógina eisini klárt.

Í gjár høvdu umboð fyri samráðandi flokkarnir fund við Fiskavirking og Føroya Banka. Áður hevur verið sagt, at samgongan verður endaliga skipað í næstu viku, men nú frættist, at tað verður helst longu í hesi vikuni.

tór.-

## Foinaven fáar metrar frá føroyska markinum:



# Besta bretska oljukeldan

**SOSIALURIN, Stavanger, Jan Müller:** Risastóra oljukeldan hjá bretum við føroyska markið Foinaven, er besta verkætlanin hjá stóra bretska oljufelagnum BP í dag.

"Hetta er okkara "top" verkætlan, og vit vænta okkum sera nógv av henni eins og eins og av øllum økinum vestanfyri Hetland."

Hetta sigur Robert Kenison, doktari hjá Brittish Petroleum Exploration við Tíðindablaðið Sosialin.

Kennison helt í gjár áhugaverdan fyrilestur á oljuráðstevnuni í Stavanger um sera lovandi framleiðsluna frá Foinaven, sum skal byrja longu í 1995.

Meðan føroysku luttakararnir lyftu oyruni, greiddi hann frá hesi oljukelduni, ið er tann fyrsta yvirhøvur vestanfyri Hetland, sum fer undir oljuframleiðslu. Bretar hava gjørt kanningar í økinum í samfull 20 ár og borað umleið 100 hol.

Nú verður so skjøtil settur á. Ætlanin er at brúka nýggjastu teknifrøðina við flótandi framleiðsluskipanum, á stóru dýpunum millum Føroyar og Hetland. Hetta er ein nógv bíligari og meiri lønandi loysn enn at brúka dýrar framleiðslupallar og at leggja oljuleiðingar á havbotnin.

BP hevur heilar tríggjar boripallar í økinum í løtuni.

Stórur áhugi er millum oljufólk á ráðstevnuni í Stavanger fyri bretsku ætlanunum.

Kennison sigur við Sosialin at Foinaven er kappingarfør við aðrar oljukeldur hjá BP.

Finna føroyingar olju hinumegin Hetlandsrennuna, so er bretska framleiðsluloysnin væl egnað at brúka á føroyskum øki eisini, sigur Kennison, doktari við Sosialin.



*Oljufelagið Amerada Hess:*

# Kann vera talan um eina og somu oljukeldu

***Amerikanska felagið »Amerada Hess«, sum var tað fyrsta felagið, ið rakti við olju stutt frá føroyska markinum, heldur tað ikki vera ómøguligt, at talan er um eina og somu oljukeldu, sum bæði BP, Shell, Texaco og Amerada Hess hava rakt við vesstan fyri Hetland, heilt stutt frá føroyska markinum***

***Jan Müller úr Stavanger***




*Tað var hesin olju-boripallurin, sum tann fyrsti, ið rakti við olju í nýggja økinum vestan fyri Hetland*

Tað fyrsta felagið, ið fann olju í nýggja økinum vestan fyri Hetland, var tað amerikanska Amerada Hess. Hetta felagið kundi longu í 1992 siga almenn-inginum frá, at boripallur tess, »Ocean Alliance«, hevði rakt við olju í blokki 204, einans seks fjórðingar frá føroyska markinum.

Pressutalskvinnan hjá Amerada Hess í Aberdeen, Penny Essen sigur við Sosialin, at tey í løtuni hyggja at, hvussu tey skulu fáa oljuna til høldar, t.v.s. um tey skulu taka hana til lands ella taka hana umborð á oljuframleiðsluskip, sum koma at liggja úti á »feltinum« har sjálv oljukeldan er.

Skal oljan flytast ti llands um oljuleiðing, so kannar Amerada Hess tríggjar møguleikar, teir eru Sollom Voe í Hetlandi, Flotta á Orknoyggjunum og Nick Ray í Skotlandi.

Hon sigur, at tey tosa við Shell og BP um, hvat er best at gera, um olja fer at koma upp úr hesum nýggja økinum. – Men tað er framvegis ein drúgvur vegur at ganga, áðrenn vit gera av, hvat skal gerast.

BP og Shell hava longu avgjørt at royna nakað nýtt, nevniliga at gera út eitt so-kallað framleiðsluskip, sum skal liggja við oljukelduna og taka ímóti oljuni. Norðmenn fingu herfyri litið upp í hendi at gera eitt slíkt skip. Talan er um at umbyggja eitt russiskt skip. Tað snýr seg um eina verkætlan upp á góðar 3 mia. kr., so tað er ikki smápengar tosað verður um. Hinvegin kann sigast, at her er talan um at royna nakað nýtt og gera íløgur í eina komandi oljuvinnu á djúpum vatni og í einum økið har eingin infrastrukturur er.

Pressutalskvinnan hjá Amerada Hess sigur víðari, at tey arbeiða framvegis við at útvikla teirra keldu. Tey vita framvegis ikki, um tað verður lønandi at framleiða olju úr hesi kelduni.

Tey kanna í løtuni støddina á goymsluni. Hon liggur bert fáar kilometrar frá Foinaven í blokki 204. Upp á fyrispurning um møguleiki er fyri, at bæði Shell, BP og Amerada Hess í veruleikanum hava fingið fatur á eini og somu oljukeldu, sigur hon, at tey sjálvandi ikki kunnu síggja burtur frá hesum møguleikanum, men tað skulu tó gerast so nógvar eftirkanningar, áðrenn ein kann siga nakað við vissu.

Amerada Hess er annars í ferð við at bora eitt annað hol í løtuni, sum ikki liggur so langt frá keldunum tey funnu í 1992. Ætlanin er so at bora enn eitt hol í 1995 í sama øki. Hjá Amerada Hess eru tey rættiliga spent at viðgera upplýsingarnar frá oljuboringini, sum hevur verið gjørd í seinastuni. Tað fara at ganga einir 10 dagar til tey hava eitt ella annað úrslit.

Upp á fyrispurning hvønn týdning tey leggja í økið vestan fyri Hetland, sigur talskvinnan hjá Amerada Hess, at tað sær rættiliga lovandi út. »We are incouraged«, sum hon málber seg.

**jan**

---

*Stóra amerikanska oljufelagið Texaco:*

# Økið millum Føroyar og Hetland sera áhugavert

***Stóra amerikanska oljufelagið Texaco, ið hevur økt sítt leitingarvirksemi í økinum millum Føroyar og Hetland ynskir ikki at siga nakað ítøkiligt um, hvat teir hava funnið, men fara um nakrar fáar mánaðir at gera eina niðurstøðu***

***Jan Müller úr Stavanger***

Spurningurin um at leita eftir og finnna olju í økinum millum Føroyar og Hetland er sera frammaliga hjá fleiri av heimsins størstu oljufeløgum. Vit hava leingi hoyrt um royndirnar hjá teimum báðum stóru oljufeløgunum BP og Shell, men vit hava ikki hoyrt so nógv um, hvat hini oljufeløgini, ið arbeiða í hesum sama økið hava fingið burtur úr.

Tey feløgini, vit fyrst og fremst tosa um eru Texaco og Amerada Hess. Men eisini onnur stór og kend oljufeløg arbeiða á hesum nýggja og lovandi oljuøkinum. Tey eru Amoco, Conaco, Elf, Statoil og Total, fyri bert at nevna nøkur teirra.

Tað var amerikanska oljufelagið Amerada Hess, sum fyrst rakti við olju í Hetlandsrennuni. Boripallurin hjá felagnum var tann, sum setti gongd á allar gitingar og prátið um, hvat hetta nýggja oljuøkið møguliga kundi bjóðað uppá.

Seinni hevur so eisni BP rakt við olju, og tað vit halda okkum vita, men ikki fáa nakað prógv fyri er, at eisini Texaco hevur funnið olju. Hetta felag er mótvegis BP og Shell sera afturlatið. Tað hevur Sosialurin sannað, nú umboð fyri flestu av heimsins størstu oljufeløgum seta hvørjum øðrum stevnu í norska oljubýnum Stavanger.

Eitt umboð fyri Texaco sigur við Sosialin, at tað er skeivt at selja skinnið áðrenn bjørnin er skotin. Við hesum vil hann fegin ávara móti ov stórum bjartskygni, áðrenn ítøkilig úrslit fyriliggja. Texaco ynskir beint øvugt av BP at ganga spakuliga um hurðarnar og ikki almannakunngera nakað, fyrr enn teir eru vísir í sínum metingum.

Umboðsmaðurin hjá Texaco vil tósiga so mikið sum at økið við Hetlandsrennuna er sera áhugavert. Tað er sera lovandi leggur hann afturat, men um tað verður eins áhugavert og Norðsjógvurin torir hann ikki at gita um.

Texaco er millum heimsins størstu oljufeløg. Felagið hevur hesar seinastu 18 mánaðirnar arbeitt sera miðvíst í tí sokallaða »Hetlandsrennuøkinum«. Teir arbeiða í blokki 202, 4-5, og arbeiða eisini saman við Amerada Hess og Fina. Her er talan um eina keldu, sum eitur »Victory«, har Texaco er operatørur. Teir hava í løtuni ein boripall í hesum økinum.

Umboðsmaðurin hjá Texaco sigur, at teir meta økið vestan fyri Hetland sum eitt sera týðandi øki. Hann viðgongur, at tað er ikki lætt at arbeiða í økinum, sum her er djúpt, aldurnar eru stórar og tað liggur langt burturi frá øðrum oljuinstallatiónum.

*Men hvussu ber tað til, at eitt felag sum Texaco í heila tikið ger íløgur í einum so óvissum og nýggjum øki?*

– Tað er tí, at tað í dag er meira lønandi at gera íløgur har enn fyri bert stuttari tíð síðani.

*Halda teir á Texaco, at økið vestan fyri Hetland verður eitt framtíðar týðandi oljuøki?*

– Nógv tosa sera positivt um heta økið. Vit kunnu so í fyrsta lagi siga nakað um nakrar mánaðir. Tá hava vit vónandi eitt úrslit.

**jan**

